## Jólatrøini verða tendrað

Hetta vikuskiftið verða tvey jólatrø tendraði í Tórshavnar kommunu. Jólatræið á Vaglinum og jólatræið við skúlan í Hoyvík, sum verða tendarað ávikavist leygardagin, kl 16.00, og sunnudagin, kl. 17.00. Sum vant verður nógv gjørt burturúr. Á Vaglinum halda Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Anna Dahl Hansen, prestur, røðu. Havnar hornorkestur fer at spæla, og fyri børn og barnsligar sálir vera bæði jólamenn, vættrar og brandbilar. Í Tinghúsgarðinum, har nýggi jólabýurin er settur upp, verður søla av mati og drekka, umframt at hugnaligar jólaframsýningar verða at síggja. Í Hoyvík fara Jógvan Arge, varaborgarstjóri, og Anna Dahl Hansen, prestur, at røða, meðan Frelsunarherurin stendur fyri tónleikinum. Eisini vitjar jólamaðurin og møguleiki verður at fáa sær ein drekkamunn. Hini jólatrøini í Tórshavnar kommunu, tvs. jólatrøini í Kirkjubø, Kaldbak, Kollafirði, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hesti, á Hvítanesi, Velbastað og Argjum verða tendrað komandi vikuskifti, og verður lýst nærri í loftmiðlunum í hesum sambandi. Á heimasíðuni www.torshavn.fo verður dagførd skrá fyri tiltøk fram til jóla at finna.

## Blóðdonarar í Klaksvík hittast

Klaksvíkar Blóðdonorlið skipar fyri hugnaløtu í komandi viku. Í fjør gjørdu tey ein døgurða fyri øllum limunum, í samband við at »liðið« fylti 50 ár. Í ár fara tey at hugna sær á Klaksvíkar Sjúkrahúsið týskvøldið 2. desember kl. 19.

# Ein vanlukka fyri føroyskt øl

**Fær Fólkaheilsuráðið sín vilja sín vilja, verður tað ein vanlukka fyri føroyskt øl og tað sær út til, at ætlanin er at bumbað okkum heilt aftur til gomlu Kattrup-tíðina, sigur stjórin í Føroya Bjór**

RÚSDREKKA-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fær fólkaheilsuráðið sín vilja, verður tað ein stór hóttan ímóti føroyskum øli.

Tað staðfesta bæði Einar Waag, stjóri og Rúni Heinesen, nevndarformaður í okkara einasta bryggjaríið, Føroya Bjór í Klaksvík.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, vil Fólkaheilsuráðið hava, at Føroya Bjór ikki longur skal sleppa at selja øl av sínum egnu goymslum kring landið.

- Hetta verður onki minni enn ein katastrofa fyri føroyska ølbrygging.

Tað ivast leiðslan í Føroya Bjór ikki í.

Rúni Heinesen, nevndarformaður í Føroya Bjór, sigur, at umleið helvtin av ølinum, sum Føroya Bjór selir, er frá egnum goymslum runt um í landinum og altso ikki ígjøgnum Rúsuna.

Samstundis ásannar hann, at vinningurin av tí, sum verður selt av egnum goymslum, er væl hægri enn av tí, sum verður selt ígjøgnum rúsuna.

- So hetta er stak óheppið, leggur hann afturat.

Hann stúrir eisini fyri at skal øll sølan yvirhøvur trunkast saman í Rúsuni, kann ta føra ávísar kapasitetstrupulleikar við sær.

- Sølan av goymslunum kring landið er meiri í heilum kassum enn tað er í Rúsuni.

Hann sigur, at seinastu árini hevur Føroya Bjór brúkt nógvan pening upp á at innrætta goymslurnar kring landið so at tær líkast meiri handlum, enn goymslum, men fær Fólkaheilsuráðið sín vilja, er allur hesin peningur farin fyri skeyti.

### Bumbast aftur í Kattrup-tíðina

Eisini Einar Waag, stjóri í Føroya Bjór, heldur, at tað sær út til, at Fólkaheilsuráðið ætlar at bumbað okkum heilt aftur til Kattrup tíðina, tá ið alt øl, vín og rúsdrekka skuldi bíleggjast í lítlum, hvítum tundurkassum úr Danmark.

- Leggur Fólkaheilsuráðið so stóra dent á atkomuligheitina er bara at avtaka rúsuna heilt, so at vit aftur fara at bíleggja frá Kattrupp, so versnar atkomuligheitin munandi, staðfestir ein smáspeiskur bryggjarístjóri.

Hann heldur ikki, at goymslurnar hjá Føroya Bjór og atkomuligheitin kunnu tengjast saman.

- Goymslan hjá Føroya Bjór í Havn er uttanfyri Havnina og har fer onki fólk til gongu. Í Suðuroy og í Sandoy eru Rúsan og goymslan hjá Føroya Bjór undir sama takið. Tað er heilt burtur við at tengja hesi bæði saman, heldur hann.




*- Lurta politikararnar eftir Fólkaheilsuráðnm, verður tað ein vanlukka fyri okkum og tað fer at føra til, at ølið verður dýrari enn nú. Og vilja vit eggja fólkið til at drekka veikari løg, er tað ikki gongda leiðin, sigur stjórin á Føroya Bjór*

### Kostar nógv arbeiðspláss

Einar Waag er sannførdur um, at verður ikki longur loyvt at selja øl av goymslunum hjá Føroya Bjór, fer tað at kosta nógv arbeiðspláss.

- So verður ikki brúk fyri nakrari goymslu, sigur hann.

Hann staðfestir eisini, at vinningurin er væl størri av tí, sum verður selt á goymslu, enn hann er av tí, sum verður selt av rúsuni.

- Sostatt verður talan um ein stóran inntøkumiss og tí verður uttan iva neyðugt at seta prísin á øli upp.

Hann heldur annars, at øl er ivaleysa dýrt, sum er, og er endamálið at fáa fólk at drekka veikari, er tað ikki gongda leiðin at gera tey veikaru sløgini dýrari.

At tað skal minka um rúsdrekkanýtsluna at stongja goymslurnar hjá Føroya Bjór, er hann ikki samdur í.

- So skulu øll niðan í Rúsuna at keypa og tá er skjótt at freistast at keypa eina fløsku ella tvær afturat og so er lítið vunnið, heldur Einar Waag.

Rúni Heinesen hevur enntá ein illgruna um, at verða tað bannað at selja av goymslunum hjá Føroya Bjór, er tað ikki fyri at tálma nýtsluni.

- Vit kunnu hava ein lítlan illgruna um, at tað kann vera fyri at tryggja Rúsuni og landskassanum størri inntøkur av rúsdrekkanýtsluni, filosoferar hann.

Einar Waag fer enntá so langt sum til at siga, at verður prísurin fyri at sleppa at bryggja sterkari øl tann, at tað verður bannað at selja av goymslunum, er tað betri at onki hendir, tí so nógv hevur sølan av goymslunum at siga.

# Fólkaheilsuráðið tekur undir við sterkari øli

**Men afturfyri skulu goymslurnar hjá Føroya Bjór kring landið, stongjast**

RÚSDREKKALÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Týsdagin fer løgtingið at viðgera uppskotið frá tjóðveldinum um at geva føroyskum bryggjaríum loyvi til at bryggja sterkari enn tað, sum nú er loyvt.

Tað er eisini ein spurningur, sum Fólkaheilsuráðið hevur viðgjørt.

Fólkaheilsuráðið tekur undir við, at bryggjaríini sleppa at bryggja sterkari øl enn 5,8%.

Men tað er ikki treytaleyst, at Fólkaheilsuráðið tekur undir við hesum.

Tí samstundis, sum ráðið tekur undir við, at loyvið verður givið til at bryggja sterkari øll enn 5,8%, mælir tað eisini politikarunum til at avtaka loyvið hjá Føroya Bjór at selja øl av sínum egnu goymslum runt um í landinum.

Fólkaheilsuráðið heldur, at umframt hugburðinum hjá fólki, er tað prísurin og atkomuligheitin til rúsandi løg, sum eru avgerðandi fyri nýtsluna.

Og verður loyvið givið til, at bryggja sterkari í Føroyum, væntar ráðið, at tað fer at kvinka nýtsluni eitt sindur uppeftir.

Men missur Føroya Bjór loyvið til at selja øl úr egnari goymslu, so at tað bara verður loyvt at selja í Rúsuni, ger tað atkomiligheitina verri og tað fer væntandi at minka um samlaðu rúsdrekkanýtsluna, heldur Fólkaheilsuráðið.

Sum tað sæst á hinari greinini, halda tey á Føroya Bjór, at lurta politikararnir eftir Fólkaheilsuráðnum, verður tað ein vanlukka.